Pól Jensen, P/F Auto:

# Tríggjar Kia Carnival eftir trimum árum

**Pól Jensen, sum koyrir hýruvogn hjá P/F Auto í Havn, hevur nú keypt sín triðja Kia Carnival síðan 2001. Hann sigur, at tað eru nógvir fyrimunir við einum slíkum bili, sum er stórur, rúmligur og sera arbeiðsligur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Derek Brockie frá D.B. Bilum handar her blómur til Pól Jensen, í sambandi við at hann keypti sín triðja Kia Carnival hýruvogn síðan 2001.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Pól Jensen koyrir nógv og dámar væl stórar bilar. Seinasti Kia Carnical, sum hann júst nú hevur skift út, hevði koyrt 195.000 km upp á tvey ár og tríggjar mánaðir.

Pól sigur, at Kia Carnival er væl egnaður sum hýruvognur. Hann er ein 7-persónabilur, sum er góðkendur til 6 ferðandi. Dargihurðar eru á báðum síðunum, og lætt er at koma inn og út hjá teimum ferðandi. Bilurin kostar 325.800 krónur.

Motorurin er ein 2,9 litur turbodiesel við 144 hk. Bilurin er toppmodellið, EX, við t.d. tokulyktum, kromhurðahandtøkum, automat girum, el-stilling av førarasetrinum, aircondition, regnsensor, leður ratt og girknøtt, borð millum setrini framman og flúgvaraborð við setrini á mittastu rekkju. El-síðuspeglini kunnu leggjast inn móti bilinum við el-megi.

Kia Carnival kom fyrstu ferð á marknaðin í 1999, og í Danmark er hann mest seldi stóri MPV, ið er skrásettur sum privatbilur.

## Renault Fluence



Á eini bilaframsýning í Onglandi sýndu Renault fram ein nýggjan sportbil, sum enn er ein prototypa. Talan er um Renault Fluence við fýra sitiplássum. Motorurin er ein 3,5 litur V6 við 280 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,5 sek

*Kelda: Motor Magasinet*



## BMW Mini

Í Onglandi eru meira enn 100.000 BMW Mini longu seldir. Roknað var við at selja 25.000 um árið í Onglandi, men sølan hevur ligið um 40.000 bilar, síðan bilurin kom á marknaðin

*Kelda: Motor Magasinet*

Renault Mondus:

# Fyrsti mini-MPV frá Renault

**Mondus, sum kemur á marknaðin síðst í hesum árinum, verður tann fyrsti MPV í miniklassanum frá Renault. Bilurin er faktiskt ein Renault Scénic í eini minni útgávu. Í mun til støddina ein rúmligur og praktiskur bilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Renault Mondus kemur væntandi á føroyska og danska marknaðin í oktober. Sum eykaútgerð kemur bilurin at fáast við xenon-forlyktum, sum snara við tá bilførarin snarar rattinum*

Renault Mondus er tann fyrsti franski bilurin, sum verður gjørdur í samstarvinum millum Nissan og Renault, Nissan Micra var tann fyrsti.

Mondus verður ein bilur í sama klassa sum t.d. Toyota Yaris, Fiat Idea og Opel Meriva.

Bilurin er rúmligur og praktiskt innrættaður. At aksilfrástøðan er stór í mun til støddina á bilinum, gevur gott beinpláss í kabinuni. Eisini er høgt til loftið og útsýnið hjá bilføraranum gott. Baksetrið kann flytast 17 cm aftur og fram, soleiðis at til ber at velja, um ein vil hava gott pláss við baksetrið ella stórt viðførisrúm, sum kann broytast frá 200 til 275 litrar, alt eftir hvussu baksetrið er stillað. Í baklúkuni er ein onnur minni lúka, sum kann latast upp á sama hátt sum á gamla Morris/Austin Mini.

Mondus fæst við trimum bensinmotorum við ávikavist 75, 95 og 110 hk. Dieselmotorarnir eru tveir við ávikavist 65 og 80 hk.

Bilurin verður 379 cm langur, 170 cm breiður og 159 cm høgur.

Renault vænta, at Mondus verður ein av mest seldu bilum í Evropa. Verksmiðjan í Spania kann framleiða 300.000 bilar árliga.

Bilurin kemur væntandi á føroyska og danska marknaðin í oktober. Prísin vita við einki um.

*Kelda: FDM Motor*



*Innan líkist Mondus nógv tí størra Renault Scénic við instrumentunum í miðjuni á instrumentborðinum*



## Dacia Logan

Renault sýna nú fyrstu myndirnar av nýggja bíliga rumenska bilinum, Dacia Logan. Verksmiðjan í Pitesti skal framleiða 700.000 bilar árliga, og áðrenn 2010 skulu eftir ætlan verða seldir 4 milliónir bilar.

*Kelda: Motor Magasinet*





TÁ TÚ SKALT RØKKA MÁLINUM

Kaupthing er ein sterk fíggjarfyritøka, sum veitir professionellar tænastur og dyggar loysnir til vinnulívið. Styrkin hjá Kaupthing er støddin og útbreiðslan av deildum í 10 ymiskum londum. Við okkara tøttu altjóða sambondum fevna førleikarnir víða, og ráðgevingin hevur altíð støði í nýggjastu menningini.

NONNI OG MANNI YDDA • 11822 • sia.is




KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag